Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

P/f Telefonverkið
Postboks 27
0110 Tórshavn

**Tórshavn 22. mars 2011**

Journal nr.: 10/00037-13
Viðgjørt: S.R.

## Avgerð viðv. órætta kapping frá Portal.fo

### 1. Samandráttur

Kappingareftirlitið fekk tann 25. og 30. november 2009 klagur frá tveimum kappingarneytum hjá P/f Telefonverkið, um órætta kapping frá Portal.fo.

Klagað verður um, at virksemið hjá FT Online ikki verður rikið á einum handilsligum grundarlagi. Klagararnir vísa á, at serliga støðan hjá P/f Telefonverkinum (Føroya Tele) sum alment partafelag ger, at teir í niðurgongutíðum, har allir aðrir noyðast at repa seglini, kunnu víðka sítt virksemi við nýggjum undirsíðum til Portal.fo.

Klagararnir vísa á, at vanligir netmiðlar kunnu ikki kappast undir hesum treytum, og tí er vandi fyri, at Portal.fo gerst einasti føroyski netmiðilin.

Kappingareftirlitið hevur við kanningum fingið staðfest, at netsíðuvirksemið hjá Føroya Tele hevur givið hall seinastu nógvu árini. Hetta er staðfest í deildarroknskapinum hjá FT Online og er eisini váttað av Føroya Tele.

Føroya Tele hevur yvirfyri Kappingareftirlitinum greitt frá, at endamálið við netsíðuvirkseminum hevur verið, at stuðla undir útbreiðslu og nýtslu av internetinum. Sølan av lýsingum hevur verið lítil partur í samlaða høpinum, og heldur hevur drívmegin aftanfyri portalvirkseminum verið, at stuðla undir nýtsluna av internetinum hjá føroyingum.

Føroya Tele hevur latið Kappingareftirlitinum eina tilsøgn, har lovað verður, at netsíðuvirksemið fer at javnviga í 2011 og frameftir. Sambært tilsøgnini verður skjalprógv latið Kappingareftirlitinum fyri, at virksemið javnvigar í 2011.

Kappingareftirlitið metir, at givna tilsøgnin á nøktandi hátt gongur teimum kappingarligu ivamálum á møti, sum eru í hesum máli. Kappingareftirlitið metir, at við hesi tilsøgn eru umstøður fyri virknari kapping á marknaðinum.

### 2. Avgerð

Kappingarráðið metir, at givna tilsøgnin vil tryggja, at umstøður eru fyri virknari kapping á marknaðinum.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt, at gera tilsøgnina frá P/f Telefonverkið bindandi, sbrt. 11, stk. 4 í kappingarlógini.

Skálatrøð 20 · P.O. Box 73 · FO 110 Tórshavn · Faroe Islands · Tel +298 35 60 40 · Fax +298 35 60 55 · kapping@kapping.fo · www.kapping.fo

## 3. Inngangur

Kappingareftirlitið fekk fyrst tann 25. november 2009 og seinni tann 30. november klagur frá tveimum tíðindaportalum um órætta kapping frá Portal.fo. Klagararnir vístu á, at Føroya Tele við almennum pengum rekur sítt virksemi á einum ikki – handilsligum grundarlagi.

Klagararnir eru ónøgdir við, at alt hetta virksemið í grundini er fíggjað av almennum pengum, og at Føroya Tele hevur eina sera ágangandi framferð á hesum øki. Serliga støðan hjá Føroya Tele sum alment partafelag ger, at teir í niðurgongutíðum, har allir aðrir noyðast at repa seglini, kunnu víðka um virksemið við nýggjum undirsíðum til Portal.fo. Klagararnir vísa á, at vanligir netmiðlar kunnu ikki kappast undir hesum treytum, og tí er vandi fyri, at Portal.fo gerst einasti føroyski netmiðilin.

Føroya Tele hevur í brævi til Kappingareftirlitið staðfest, at endamálið við rakstrinum av Portal.fo og undirsíðum hevur verið at stuðla undir útbreiðslu og nýtslu av internetinum. Sølan av lýsingum hevur verið ein lítil partur í samlaða høpinum, og heldur hevur drívmegin aftan fyri portalvirkseminum verið at stuðla undir nýtsluna av internetinum hjá føroyingum.

Kappingareftirlitið hevur í sambandi við málsviðgerðina innsavnað roknskaparupplýsingar um Portal.fo og undirsíður.

## 4. Fyritøkan

Føroya Tele er størsti veitari av kunningar- og fjarskiftistænastum í Føroyum. P/f Telefonverkið er móðurfelag í samtakinum. Fýra dótturfeløg eru í samtakinum, hesi eru FT Net, SHEEFA, Televarpið og Formula.fo.

Føroya Tele varð í 2005 skipað sum samtak, har stórur partur av verandi virksemi varð lagt í tvey dótturfeløg, FT Samskifti og FT Net. Endamálið við hesum uppbýti var at skapa gjøgnumskygni millum netpartin og tænastupartin hjá Føroya Tele. FT Samskifti er síðani lagt inn í móðurfelagið aftur.

Mynd 1: Føroya Tele samtakið




FT Net rekur fjarskiftisnetið hjá Føroya Tele, og fevnir hetta um kaðalnetið, luftborna netið, transmissión og bygningar. FT Net selur atgongd til øll net hjá felagnum. Størstu avtakarar av hesum tænastum eru Føroya Tele, Vodafone og Elektron.

P/f SHEEFA selur atgongd til Shefa 2 kaðalin. Hesin kaðal bindur Føroyar til skotska meginlandið umvegis Hetland. Størstu kundarnir eru føroysku fjarskiftisveitararnir og bretsku feløgini British Telecom og British Petroleum.
P/f Televarpið selur hald til sjónvarpsrásir umvegis fylgisvein. Vanligi kundin er privata húskið.

P/f Formula selur tól- og ritbúnað og selur tænastur sum t.d. ráðgeving, brúkarahjálp og viðlíkahald. Vanligi kundin er fyritøkur og almennir stovnar.

Nøkur virkisøkið eru framvegis at finna í móðurfelagnum. Eitt av hesum virkisøkjum eru netsíðuvirksemið, ið hetta mál snýr seg um. Raksturin av Portal.fo og undirsíður verður røktur av FT Online, sum er ein deild í P/f Telefonverkinum. Virksemið hjá FT Online fevnir um sølu av lýsingum, prent og útbering av telefonbókini, umframt sølu og menning av Portal.fo og undirsíðum.

Netsíðuvirksemið hevur altíð ligið í móðurfelagnum, men FT Online er ein deild, sum varð sett á stovn við tí endamáli at gera hetta virksemið til eitt inntøkuskapandi øki. Somuleiðis arbeiðir FT Online miðvíst móti at menna internetmarknaðin í Føroyum. T.d. skipaði FT Online fyri tiltaki herfyri, har útlendskir serfrøðingar greiddu frá internetinum sum lýsingarmiðli.

Sambært yvirliti sum er komið frá Føroya Tele(sí talvu 1), hevði deildin FT-online í 2009 hall áðrenn avskrivingar og rentur á [...] mió. kr. Samlaði umsetningurin var [...] mió. kr. Tað framgongur eisini greitt av yvirlitinum, at tað er sølan av telefonbókini, ið gevur eitt positivt íkast, meðan Portal.fo og undirsíður, umframt aðrar verkætlanir, geva eitt negativt íkast.

Talan er um deildarroknskap, og tí síggjast ávísar útreiðslur ikki, og tí er ikki talan um eitt endaligt ársúrslit, men eitt úrslit áðrenn avskrivingar og rentur. Talan er tí ikki um tøl, sum vísa hvat veruliga undirskotið er av virkseminum, men heldur tøl sum vísa klára ábending um eitt endaligt rakstrarhall.

Talva 1: FT Online - Rakstur í 2009

| Virksemi | Tilsamans | Telefonbókin | Portalar | verkætlanir |
|---|---|---|---|---|
| Nettosøla | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Rávøra og hjálpitilfar | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Kostnaður av støðisogn | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Annar kostnaður | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Bruttovinningur | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Starvsfólkakostnaður | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar | [...] | [...] | [...] | [...] |

Kappingareftirlitið hevur eisini innsavnað tilfar frá FT Net, ið vísir hvussu raksturin hevur verið áðrenn stovnanina av FT Online. Sum tað framgongur av talvu 2 hevur úrslit áðrenn rentur og avskrivingar verið negativt síðani 2006. Vísast skal á, at talan er ikki um veruligan rakstrarroknskap, men um posteringar sum FT hevur gjørt í sambandi við fyrispurning frá Kappingareftirlitinum. Tølini geva tó ábendingum um, at netsíðuvirksemið hevur verið rikið við rakstrarligum halli øll árini 2006-2009.

Talva 2: Rakstrar kostnaðir víðv. Portal.fo í tíðarskeiðnum 2006-2009

| Rakstur | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| Tænastuinntøkur | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Vørusøla | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Nettosøla | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Rávøra og hjálpitilfar | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Kostnaður av støðisogn | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Annar kostnaður | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Bruttovinningur | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Starvsfólkakostnaður | [...] | [...] | [...] | [...] |
| Úrslit áðrenn rentur og avskrivingar | [...] | [...] | [...] | [...] |

Kappingareftirlitið hevur eisini fingið staðfest á fundi við umboð fyri Føroya Tele, og somuleiðis í brævi frá Føroya Tele, dagfest 27. Januar 2010, at raksturin hevur givið hall øll árini. Sagt verður, at Portal.fo og undirsíður hava havt til endamáls at stuðla undir útbreiðslu og nýtslu av internetinum og í minni mun at reka virksemi á einum handilsligum grundarlagi.

## 5. Marknaður

FT Online og klagararnir vinna sær inntøku við at selja lýsingapláss á netsíðum sínum. Lýsingaplássið verður selt antin beinleiðis til lýsarar ella umvegis lýsingastovur.

Lýsingapláss á netinum verður oftani buntað[1] við øðrum lýsingaplássi. T.d. selja føroysku bløðini eina vøru har lýsing á heimasíðu og prentalýsing í blaðnum er íroknað.

Portal.fo er, sum navnið sigur, ein portalur. T.v.s. ein inngongd hjá brúkaranum til ymiskt innihald. Tann, sum vitjar Portal.fo, fær atgongd til tíðindi, ymsar leititænastur, starvslýsingar, undirsíður um ítrótt, móta o.a., sjón- og útvarpsskráir. Í stuttum kann sigast, at Portal.fo gevur atgongd til alt á netinum, sum er á føroyskum. Føroya Tele hevur avtalu við ávíst tíðindablað, um at veita stutt tíðindi til Portal.fo

Klagararnir reka heimasíður hvørs innihald er tíðindi og kunning av ymiskum slag.

Kappingareftirlitið hevur valt ikki at savna inn roknskapartøl fyri hetta virksemið. Heldur eru tøl av vitjandi á heimasíðunum brúkt til at fastleggja marknaðarstøðuna. Kappingareftirlitið metir, at hesin háttur fullvæl vísir marknaðarstøðuna hjá einstøku fyritøkuni á marknaðinum. Hetta tí at samanhangur er millum tal av vitjandi og tann lýsingaprís, sum viðkomandi fyritøka kann taka.

Kappingareftirlitið hevur valt at taka føroyskar vinnuligar netsíður við, hóast hesar ikki eru at meta sum portalar. Kappingareftirlitið metir, at um sæð varð burtur frá slíkum síðum, vildi skilmarkingin í tílíkum førum verið ov avmarkað, tí lýsarar kunnu hugsast at leggja áherðslu á vitjunartalið, og ikki hvat slag av netsíðu talan er um.

Kappingareftirlitið hevur brúkt Vevmátingarlistan hjá Gallup Føroyar sum grundalag. Trupulleikin við at nýta henda er, at talan er um eina sjálvbodna loysn. Eitt nú er Vágaportalurin ikki at finna á Vevmátingarlistanum. Kappingareftirlitið hevur tí innsavnað hagtøl frá teimum heimasíðum, sum vit mettu høvdu eitt sindur av vitjandi, og sum kundu metast at vera vinnuligar netsíður. Tað er møguligt, at onkur er gloppin upp ímillum, men Kappingareftirlitið metir tó, at mynd 2 er umboðandi fyri tann føroyska internet lýsingamarknaðin.

Ein annar trupulleiki er, at ikki allar av netsíðunum á vevmátingarlistanum selja lýsingapláss. Her hevur Kappingareftirlitið valt at síggja burtur frá hesum síðum. Somuleiðis eru einans netsíður við 1000 brúkarum

[1] Bundling

ella meir tiknar við. Báðar hesar avmarkingar eru gjørdar fyri, at netsíðuvirksemið, sum samanborið verður við, verður rikið á einum handilsligum grundarlagi.

**Mynd 2: Tal av brúkarum í viku 10/2011**




Facebook er eitt sosialt net, sum nógvir føroyingar nýta til samskifti. Facebook er eisini ein lýsingamiðil, ið verður brúktur í Føroyum. Styrkin hjá Facebook er, at lýsingin kann vera málrættað til ein ávísan skara av møguligum kundum, grundað á tey sereyðkenni sum lýsarin heldur, at málbólkurin hevur.

Kappingareftirlitið hevur tann 15. mars 2011 kannað, hvussu nógvir føroyingar eru á Facebook. Hetta er gjørt gjøgnum lýsingaramboðið á Facebook. Sambært Facebook eru 28.300 brúkarar, sum hava sett Føroyar sum heimstað.

Sambært kanning hjá Norðuratlandsbólkinum eru 7.737 føroyingar í 1. ættarliði, og bróðurparturin av hesum eru uttan iva lesandi. Hesi munnu metast at hava serliga sterk bond til Føroyar, og vitja uttan iva regluliga á Portal.fo. Kappingareftirlitið hevur valt at leiðrættað talið av Facebook brúkarum við einum helmingi av hesum tali. Hetta er gjørt út frá eini meginreglu um varsemi. Tað er tó sannlíkt at flestu av teimum 7.737 hava stovnað seg á Facebook sum heimahoyrandi í Føroyum, tí brúkararnir eru stovnaðir áðrenn tey eru flutt til Danmarkar.

Brúkaratalið á Facebook er ikki sambærligt við brúkaratalið hjá Vevmátingarlistanum hjá Gallup Føroyar, tí brúkaratalið á Facebook er grundað á skrásettar brúkarar, meðan brúkaratalið hjá Gallup er grundað á IP-adressur. T.v.s. at ein persónur, sum hevur tvær teldur verður skrásettur sum tveir brúkarar á Vevmátingarlistanum.

Fyri at samanbera Facebook brúkararnar við vevmátingarlistan hjá Gallup er neyðugt at leiðrætta fyri henda munin. Hetta hevur Kappingareftirlitið gjørt við at gera eina meting av, hvussu stórur partur av fólkinum hevur regluliga atgongd til meira enn eina teldu.

Kappingareftirlitið
FAROESE COMPETITION AUTHORITY

Hugt hevur verið eftir, hvussu nógvir skúlanæmingar eru, hvussu nógv fólk arbeiða innan fígging og trygging, hvussu nógv arbeiða inna almenna og kommunala umsiting, og hvussu nógv arbeiða innan undirvísing.

Kappingareftirlitið metir, at tað er sannlíkt, at bróðurparturin av hesum borgarum hava atgongd til tvær teldur, tí at hesi kunnu brúka arbeiðsteldur sínar og telduna heima. Hesi fólk hava eisini ofta eina fakliga bakgrund, sum ger, at tey sannlíkt eiga teldu heima og hava arbeiðsteldu. Talan er eisini í stóran mun um arbeiðspláss, ið ofta veita sínum starvsfólkum atgongd til at keypa teldur umvegis arbeiðsgevaran til serligar treytir.

Grundað á hesi viðurskifti metir Kappingareftirlitið, at talið av fólkum, sum hava regluliga atgongd til tvær teldur er uml. 48% av samlaða fólkatalinum. Kappingareftirlitið hevur tí økt Facebook brúkaratalið við einum helmingi.

Mynd 2 vísir, at Føroya Tele hevur nógv flest vitjandi (54%), á øðrum plássi er Facebook (16%) og triðja plássi er Vágaportalurin (14%). Kringvarpi, Norðlýsið og Dimma liggja øll við undir 10% av samlaðu vitjandi sambært Vevmátingarlistanum hjá Gallup.

Við støði í hesari meting er ábending um, at Føroya Tele hevur eina marknaðarráðandi støðu á marknaðinum fyri sølu av lýsingum til internetportalar.

## 6. Atburður

Framferðin, sum klaga verður um, er, at Føroya Tele ikki rekur sítt portalvirksemi á einum handilsligum grundarlagi. Klagararnir vísa á, at tað er ógjørligt hjá privatum fyritøkum at kappast við eitt alment partafelag, sum áhaldandi kann gera nýíløgur í nýggjar undirsíður, hóast virksemið gevur undirskot.

Kappingareftirlitið hevur staðfest, at hetta virkisøkið verður rikið við halli, og at rakstrarligt hall hevur verið øll árini síðani 2006. Umboð fyri Føroya Tele hava víst á, at Portal.fo var eitt átak hvørs endamál var at stuðla undir útbreiðsluna og nýtslu av internetinum í Føroyum. Sølan av lýsingum hevur verið ein lítil partur í samlaða høpinum, og heldur hevur drívmegin aftan fyri portalvirksemið verið at stuðla undir nýtsluna av internetinum hjá føroyingum.

Sambært § 11, stk. 3, nr. 1 er forboð ímóti at nýta órímiligar keyps- ella søluprísir. Forboðið fevnir um bæði ov høgar og ov lágar prísir. Vanliga merkja lágir prísir, at virkin kapping er, men í serligum førum kann ein kapitalsterk fyritøka selja við tapi fyri at beina aðrar kappingarneytar av marknaðinum, fyri á hendan hátt at fáa eina støðu á marknaðinum, sum er lík monopoli. Sambært ES – rættarsiðvenju er talan um órímiliga lágar prísir, tá søluprísurin antin er lægri enn broytiligur miðal kostnaður[2] ella lægri enn samlaði miðal kostnaðurin og onnur viðurskifti talan fyri harðrendari framferð[3].

Tað eru tó ávís undantøk fyri hesum reglum. Tað verður m.a. vanliga góðtikið, at fyritøkur selja undir kostnaðarprís, fyri at sleppa av við vørur sum spillast, vørur har kostnaðirnir av at goyma vøruna eru øktir munandi ella í sambandi við, at fyritøkan letur nýggjar vørur á marknaðin[4].

Kappingareftirlitið hevur ikki kannað beinleiðis um søluprísurin hjá Føroya Tele á hesum marknaði er lægri enn broytiligur miðal kostnaður ella undir samlaða miðal kostnaðinum, tí fyritøkan er komin við eini tilsøgn. Tað er tó greitt, at Føroya Tele yvir eitt rættuliga langt tíðarskeið hevur rikið hetta virksemið við munandi halli.

---

[2] Levinsen (2009;759)
[3] Levinsen(2009; 760)
[4] Levinsen(2009; 771)

## 7. Tilsøgn

Ein fyritøka hevur sambært §11, stk. 4 smbr. §23, stk. 1, møguleika at geva eina tilsøgn, sum gongur ivanum hjá Kappingarráðnum á møti, og harvið endar málið. Kappingarráðið kann gera tilsøgnina bindandi fyri fyritøkuna.

Kappingareftirlitið hevur yvirfyri Føroya Tele víst á tann kappingarliga trupulleikan í málinum, og Føroya Tele vísti týðiliga í málsviðgerðini áhuga fyri at koma við eini tilsøgn, sum kundi loysa teir kappingarligu trupulleikar, sum virksemið hjá FT Online gevur.
Kappingareftirlitið og Føroya Tele hava verið í samráðingum um, hvat slík søgn skuldi innihalda. Tann 10. Mars 2011 er tilsøgn komin frá Føroya Tele, sum Kappingareftirlitið metir loysir hesar kappingarligu trupulleikar.

**Mynd 3: Tilsøgn frá Føroya Tele**

**Kappingareftirlitið**
**Skálatrøð 20**
**P. O. Box 73**
**FO 110 Tórshavn**

Tórshavn, hin 23. mars 2011

**<u>FT Online</u>**:

Vísandi til teldupost frá Kappingareftirlitið frá 21. desembur 2010 og annað samskifti í hesum málið vil Føroya Tele vegna FT-Online geva tilsøgn um at:

1. í 1. ársfjórðingi 2011 skal alt virksemi hjá FT Online javnviga, og at
2. í 3. ársfjórðingi 2011 skal netsíðuvirksemi hjá FT Online javnviga (her verður telefonbókin og nummar.fo sostatt ikki tikið við)

Føroya Tele vil senda Kappingareftirlitinum skjalprógv fyri at virksemi hjá FT Online javnvigar í 1. ársfjórðingi og at netsíðurnar hjá FT Online javnviga í 3. ársfjórðingi.

Vinarliga

Kristian R. Davidsen
Stjóri

## 8. Meting

Kappingareftirlitið metir seg hava staðfest, at Føroya Tele er ráðandi á marknaðinum fyri netlýsingar í Føroyum, og at Føroya Tele hevur rikið portalarnar við halli yvir eitt longri tíðarskeið.

Kappingareftirlitið hevur ikki gjøgnumført eina nágreiniliga meting um prísurin á lýsingum á portal.fo og undirsíðum liggur undir broytiliga miðal kostnaðinum ella samlaða miðal kostnaðinum. Orsøkin til hetta er, at Føroya Tele er komið við eini tilsøgn, sum Kappingareftirlitið á nøktandi hátt gongur teimum kappingarligu ivamálum á møti, sum eru í málinum.

Kappingareftirlitið metir, at tá netsíðuvirksemið hjá Føroya Tele fer at javnviga, vilja klagararnir og aðrir tíðindaportalar hava somu møguleikar sum Føroya Tele at kappast um lýsingar. Sostatt skuldi tann kappingaravlagingin, sum hevur verið á marknaðinum verði burtur.

Fyrimunurin av at kunna enda mál við samráðing við partarnar er, at tað er smidligt, skjótt og orkusparandi. Kappingareftirlitið metir, at tað er ein fyrimunur, at Føroya Tele hevur luttikið virkið fyri at finna fram til eina loysn á trupulleikunum, sum teirra atburður skapar, tí Føroya Tele hevur størri innlit í marknaðarviðurskifti og teirra egnu fíggjarligu støðu, og tí er tað oftani møguligt at finna fram til loysnir, sum betur loysa ítøkiligu ivamálini.

Kappingareftirlitið metir eisini, at fyrimunur er við at gera tilsøgnina bindandi, við tað at tilsøgnin er framhugsandi og hevur við sær, at avgerðin ásetir, hvat skal gerast ella ikki gerast frameftir. Ein møgulig avgerð hjá Kappingarráðnum um brot á Kappingarlógina snýr seg um tað, sum farið er, tó at hon sjálvsagt vildi havt ein virknað frameftir.

Kappingareftirlitið metir, at við at gera hesa tilsøgn bindandi, kann virkin kapping skapast, og tí verður mett, at endamálið við kappingarlógini um, við virknari kapping at fremja eina fulldygga samfelagsliga tilfeingisnýtslu verður rokkið, um tilsøgnin verður gjørd bindandi.

Kappingareftirlitið mælir til, at tilsøgnin frá Føroya Tele, dagfest 7. mars 2011 verður gjørd bindandi, og at málið hereftir verður endað.

## 9. Niðurstøða

Kappingarráðið metir, at givna tilsøgnin vil tryggja, at umstøður eru fyri virknari kapping á marknaðinum.

Kappingarráðið hevur tí avgjørt, at gera tilsøgnina frá P/f Telefonverkið bindandi, sbrt. 11, stk. 4 í kappingarlógini.

Vegna Kappingarráðið

Ingunn Ó. Eiriksdóttir
Forkvinna

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri